LÖGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

# AVTALA
# um
# mannagongd í sambandi við kunngering av rættarreglum frá ríkismyndugleikunum

## 1.1. Rættarreglur, ið verða lýstar í Kunngerðarblaðið B

Sambært § 2 í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur givnar av landsstýrinum lýsast í Kunngerðablaðnum, og sambært § 3 er lýsingin í Kunngerðablaðnum einasti bindandi kunngerðarhátturin av løgtingslógum v.m.

Sambært § 1 í lov nr. 735 af 6. december 1989 om kundgørelse af love, anordninger og bekendtgørelser på Færøerne, sum broytt við lov nr. 157 af 20. februar 2013, skulu lógir fyriskipanir/anordningar og kunngerðir frá ríkismyndugleikunum, sum skulu galda fyri Føroyar, kunngerast í landsstýrisins kunngerðarblaði fyri Føroyar, Kunngerðablaðið.

Kunngerðarblaðið hevur eina A- og eina B-útgávu.

Í **B-útgávuni** verður øll lóggáva, sum eru undir donskum málsræði, lýst. Hetta er fólkatinglógir, kongeligar anordningar/fyriskipanir og bekendtgørelser.

Eisini verða altjóða sáttmálar, sum Danmark hevur gjørt og sum fevna um Føroyar, lýstir í B-útgávuni.

## 1.2. Freistir og útgávudagur

Kunngerðablaðið verður vanliga givið út ***fríggjadagar***.

Tilfar, sum skal lýsast í B-útgávuni, skal sendast Løgmansskrivstovuni sum talgiltur PDF-fílur.

Hetta verður gjørt umvegis embætisgivnu teldupostadressu Ríkisumboðsins:
ro@fo.stm.dk

Í teldupostinum skal ynskti útgávudagurin (fríggjadagurin) við dagfesting viðmerkjast. Tað skal eisini upplýsast, hvat føroyskt aðalráð hevur havt “bekendtgørelser” til ummælis sambært § 49 í Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um Stýrisskipan Føroya.

Talgildar PDF-fílur skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagar kl. 14.00, um lýsast skal fyrstkomandi fríggjadagin aftaná. Í serligum førum kann Løgmansskrivstovan gera frávik frá freistini um innlating av rættarreglum.

Talgildu PDF-fílurnar skulu sendast til hesar 3 teldupostadressurnar:
info@tinganes.fo ; mortanh@tinganes.fo ; gudrida@tinganes.fo

## 1.3. Kunngerðing og kostnaður

Løgmansskrivstovan ber kostnaðin av kunngerðing í Kunngerðablaðið B.

## 1.4. Bráðfeingis boð

Um tørvur er at senda bráðfeingis boð, uttanfyri vanligari arbeiðstíð viðv. kunngerðing skal ringjast til: Mortan Hentze, tlf. 55 80 71; Guðrið D. Andreasen, tlf. 55 80 93; Nellu Festirstein, tlf. 55 80 76.

Bráfeingis boð kunnu eitt nú vera boð um afturkalling av einari rættarreglu, áðrenn útgávu o.l.

## 1.5. Praktisk viðurskifti

Løgmansskrivstovan leggur nýtt høvd á PDF'in frá Ríkisumboðnum við ynskta útgávudegnum. Hugsast kann tó, at rættarreglur viðhvørt mugu setast upp av nýggjum, eitt nú um Løgmansskrivstovan fær tær í einum ikki lesbærum líki. Í slíkum førum skal Løgmansskrivstovan hava kunngerðina í so góðari tíð sum gjørligt fyri at kunna gera neyðugar tillagingar.

Endaligi PDF-fílurin verður altíð sendur Ríkisumboðnum til góðkenningar, áðrenn lýst verður. PDF-fílurin skal sendast til: ro@fo.stm.dk

## 1.6. Endaviðmerking

Hendan avtalan verður gjørd og undirskrivað í tveimum útgávum; einari føroyskari útgávu og einari danskari útgávu. Avtalan frá 28. mai 2013 um mannagongd í sambandi við kunngering av rættarreglum frá ríkismyndugleikunum fellur burtur.

| | |
|---|---|
| Tórshavn tann<br>5. mai 2014<br>fyri Løgmansskrivstovuna: | Tórshavn tann<br>5. mai 2014<br>fyri Rigsombuddet: |
| Nella Festirstein | Dan M. Knudsen |